# Løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 20. desember 2016

*Endamál*

**§ 1.** Henda lóg skipar Búskapargrunn Føroya, ið skal tryggja búskaparligu áhugamál Føroya fólks, tá ræður um at nýta serinntøkur landsins, og skal nýtast sum amboð at røkka einum sjálvberandi búskapi, við:
a) at tálma sveiggjum í føroyska búskapinum
b) at tryggja samfelagnu og landskassanum gott lánføri

*Inntøkur grunsins*

**§ 2.** [1] Serinntøkur landsins verða settar til síðis á fíggjarlóg og í roknskapi landsins á serstaka kontu, nevnd Búskapargrunnur Føroya.

*Stk. 2.*[2) 1)] Serinntøkur eru:
1) Inntøkur frá kolvetnisútvinningi
2) ágóði av einskiljing landsins
3) játtan á fíggjarlóg
4) inntøka av íløgurøkt grunsins

*Stk. 3.* [1] Umframt serinntøkurnar í stk. 2, skal partur av avlopinum hjá landskassanum flytast í Búskapargrunn Føroya:
1) 20 prosent av uppgjørda RLÚ I úrslitinum, tá ið avlopið er millum 0 og 200 mió. kr.
2) 50 prosent av tí parti av RLÚ I úrslitinum, ið er oman fyri 200 mió. kr.

*Útgjaldskipan*

**§ 3.** Úr Búskapargrunni Føroya verða gjøld flutt til landskassan sambært ásetingunum í stk. 2, 3 og 4.

*Stk. 2.* 50 % av serinntøkunum sambært § 2 verða goldin grunninum sum eginpeningur, meðan hini 50 % verða útgoldin landskassanum yvir 5 fylgjandi ár í eins stórum pørtum. Hetta er tó ikki galdandi fyri tilfeingisgjald av kolvetni, har 100 % verður goldið grunninum sum eginpeningur.

*Stk. 3.* Tá ið eginpeningur grunsins er størri enn ein tíggjundapart av BTÚ, letur grunnurin landskassanum miðal realvinningin av íløgurøktini fyri 4 av seinastu 5 árunum.

*Stk. 4.* Grunnurin letur ikki landskassanum onnur gjøld ella skatt.

*Umsitingarlig viðurskifti*

**§ 4.** Eginpeningur verður sett í virðisbrøv á fíggjarmarknaðinum eftir almennum leiðreglum um størst møguligan vinning við atliti til spjaðing av váða.

**§ 5.** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum stendur fyri og rindar umsiting av Búskapargrunni Føroya sum serliga roknskaparliga eind við egnari eginogn. Grunnurin er ogn landskassans. Broytingar í eginogn grunsins verða bert roknaðar sum broytingar í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum.

*Stk. 2.* [1] Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um røkt av fæ grunsins. Landsbanki Føroya umsitur grunnin.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin leggur fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um leiðreglur fyri

íløguvirksemi hjá grunninum.

*Stk. 4.* Gjørdur verður serligur eindarroknskapur fyri búskapargrunnin.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Lógin fær virknað fyri alt árið 2011, ið skal vera fyrsta roknskaparár grunsins.

Tórshavn, 7. juni 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 184/2010

---

[1] Broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 20. desember 2016, har § 2 ljóðar soleiðis: "Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017."

[2] Broytt við løgtingslóg nr. 170 frá 23. desember 2011, har § 2 ljóðar soleiðis: "Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, og fær virknað frá 1. januar 2011."